# r í hýrum



*Veiðivirið í fjør var umleið 200 miljónir krónur. Hetta gav ein hýru-og lønarpart á heilar 76,8 miljónir krónur, sum avgjørt sæst aftur í nærumhvørvinum og í samfelagnum í síni heild*

einir 55 mans knýttir fast at skipinum. Tó hava fleiri enn hesir 55 menninir verið við, tá eitt árið er umliðið.

Í fjør fingu einir 70 mans fleiri og færri túrar við Norðborg.

### Á svartkjafti

Verksmiðjutrolarin er í løtuni á svartkjaftaveiði vestur úr Írlandi. Teir fóru avstað næst seinasta leygardag, men veðrið hevur verið vánaligt, og skipið hevur ligið bakk onkran dag á túrinum.

Jón Rasmussen, skipari, sum hevur frítúr hendan túrin, sigur, at svartkjafturin verður heysaður og skráskorin.

- Hóast líkindini ikki hava verið nakað serlig, hevur fiskiskapurin roynst rímiliga væl, og nú restar skipinum bara nøkur fá tons í fulla last.

Hann væntar, at Norðborg kemur í Ánirnar at landa, tá henda vikan fer at halla.

Hendan túrin er Bogi Rasmussen skipari.

*vilmund@sosialurin.fo*

# kvotu

henda rætt til einkis, sigur Jacob Vestergaard.

Eins væl og fiskifrøðin er órógvað av stóru kvotunum, sum londini hava ásett sær fyri árið 2011, er landsstýrismaðurin heldur ikki fegin um, at hetta tilfeingi í løtuni ikki verður veitt við fyriliti.

- Tað áliggur strandalondunum at samstarva um loysnir, soleiðis at makrelstovnurin verður veiddur burðardygt, sigur Jacob Vestergaard.

ICES hevur mælt til, at heildarkvotan av makreli í ár í mesta lagi verður 646.000, men alt bendir á, at veiðan fer at liggja um eina miljón tons, tá samanum kemur.

ES, Noreg og Ísland ásettu sær eginkvotur av makrelkvoti longu í desember, og tá ES og Noreg hevur tiltuskað sær sín part, vóru bert 10% eftir av tilmæltu heildarkvotuni til Ísland og Føroyar.

- Vit bíðaðu sum longst og til allar samráðingarleiðir vóru royndar, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum mánadagin gjørdi av, at føroyska eginkvotan av makreli í 2011 verður 150.000 tons tilsamans.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað verður minni hjá flakatrolarunum at fiska í Barentshavinum, nú eingin fiskiveiðisáttmáli er við Noreg í ár*

# Eitt ár við ongum fiskiveiðisáttmála við Noreg og ES

**EINGIN SÁTTMÁLI** At Føroyar onga fiskiveiðiavtalu hava við Noreg og ES í ár er ein nýggj vend í føroyskari fiskivinnusøgu. Men á hinari síðuni kemur so økta makrelkvotan, sum gevur føroyskari fiskivinnu nýggjar og øktar møguleikar

Vilmund Jacobsen

Føroyski nótaflotin hevði eitt gott ár í fjør, hvat veiðivirði viðvíkur. Orsøkin var ikki minst økta makrelkvotan og góða veiðan, sum var eftir makreli í fjør.

Í fjør samdust strandalondini ikki um býtið av felags makrelkvotuni og ásettu sær tískil – hvør í sínum lagi - sína eginkvotu. Hetta fekk tó ikki avleiðingar fyri sínámillum fiskirættindasáttmálan millum Føroyar og Noreg og Føroyar og ES.

Men í ár, nú strandalondini heldur ikki samdust um býtið av felagskvotuni, er støðan ein onnur.

### Eingin sáttmáli

Hvørki Noreg ella ES vilja gera sínámillum fiskiveiðiavtalu við Føroyar, tí føroyskir myndugleikar ikki vildu krúpa til krossin og ganga við til ein minni kvotupart við makrelinum.

Úrslitið er, at Føroyar í 2011 onga fiskiveiðiavtalu hava við Noreg og ES, meðan vit á hinari síðuni kunnu fiska enn meiri makrel í 2011, enn høvi var í 2010.

Prísurin fyri ósemjuna um makrelin fer í fyrsta lagi at kosta føroysku flakatrolarunum kvotu í norska partinum av Barentshavinum, eins og føroysk rækjuskip neyvan sleppa at fiska rækjur í Grønlandi, sum í hesum førinum er partur av ES.

Teir, sum eiga flakatrolararnir, hava sagt, at hetta kemur at fáa avleiðingar fyri teir.

Føroyska kvotan í russiska partinum av Barentshavinum er størri enn kvotan í norska partinum av Barentshavinum, men við tað, at fiskurin í norskum sjógvi vanliga er størri, fæst lutfalsliga meiri fyri hendan fiskin.

Tó skilst, at samanlagda virðið av toskinum, sum vit fáa í býti frá russum, er størri enn virðið av norska toskinum.

Hvønn týdning tað kemur at fáa fyri flakatrolararnar, at teir ikki sleppa í norskan sjógv í ár, fer at síggjast, tá árið er liðið.

### Nýggj vend

At Føroyar onga fiskiveiðiavtalu hava við Noreg og ES í ár er ein nýggj vend í føroyskari fiskivinnusøgu.

Á hinari síðuni kemur so økta makrelkvotan, sum gevur føroyskari fiskivinnu nýggjar og øktar møguleikar.

Nógvir vilja sleppa fáa lut í makrelkvotuni – og sjálvt Felagið Línuskip hevur vent sær til Fiskimálaráðið um, at felagið vil hava sín part. Tó at línuskip ikki kunnu fiska kvotuna sjálvi, halda tey seg ívaleyst kunna fáa nakað burtur úr við at lata aðrar fiska ein møguligan kvotupart fyri seg.

> » ... hvønn týdning tað kemur at fáa fyri flakatrolararnar, at teir ikki sleppa í norskan sjógv í ár, fer at síggjast, tá árið er liðið...